

## Royndarframleiðslan á Breagh væleydnað

Faroe Petroleum boðar frá, at royndarframleiðslan frá báðum brunnunum, sum vórðu boraðir á Breagh økinum, í syðra parti av bretska Norðsjónum, eydnaðist væl. Undir royndarframleiðsluni vórðu upp til 26 mió kubikk føtur av gassi framleiddar um dagin, úr eini gassfláð, sum er 1200 føtur long. Faroe Petroleum hevur 10% av loyvinum. Góða úrslitið staðfestir, at Breagh gasskeldan er rakstrarverdugt. Arbeitt verður nú víðari við verkætlanini, og mett verður, at nøgdin av gassi í Breagh kelduni er 20% størri enn áður mett. Málini, sum vórðu sett fyri Breagh boriverkætlanini í 2008, eru nú nádd, og seinastu metingarbrunnarnir og royndarframleiðslan føra Breagh eitt stig nærri útbygging.

# BP rýmir helst av landgrunninum í ár

**– Vit fara at síggja broytingar, at feløg bæði fara út og koma inn. Og soleiðis vil tað altíð vera, tí feløg broyta og endurskoða eisini sínar ætlanir. Tað er ikki óhugsandi, at nýggj feløg koma inn í føroyska økið í ár, tvs. at tey keypa seg inn í verandi loyvi sigur Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi**

OLJUÁRIÐ 2009
*Jan Müller*
*jan@sosialurin.fo*

Tvey av teimum stóru feløgunum, sum hava verið við í oljuleitingini við Føroyar í eini 15 ár ella meira, BP og Shell eru við í loyvum, sum ganga út í hesum árinum. Loyvið, har Williambrunnurin varð boraður, er eitt 9 ára loyvi og gongur út í august. Tað skilst, at BP ikki er sinnað at longja hetta loyvi, og av tí at felagið ikki er við í nøkrum øðrum loyvi á landgrunninum, er ikki óhugsandi, at hesin bretski oljurisin ikki verður við í føroyskari oljuleiting eftir summarfrítíðina. Hvussu stætt er við Shell er so ein annar spurningur. Felagið fer neyvan at halda fram við loyvinum, har William varð boraður. Men felagið er so við í einum øðrum loyvi á landgrunninum. Tað var Enterprice, sum fekk tað loyvið. Seinni er hetta felagið keypt upp av Shell.

Uppá fyrispurning um BP fer úr føroyska økinum eftir summarfrítíðina sigur Petur Joensen, at tað veit hann ikki. Men rætt er sigur hann, at loyvi hjá BP gongur út í august. Hann váttar eisini, Shell er so eisini við í einum øðrum loyvi gjøgnum sítt dótturfelag Enterprice.

### Nýggj feløg koma

Hóast útlit kunnu vera fyri, at stór og gomul oljufeløg fara at rýma av landgrunninum í ár, so sær stjórin á Jarðfeingi eisini møguleika fyri, at onnur nýggj feløg koma við í leitingina.

– Vit fara at síggja broytingar, at feløg bæði fara út og koma inn. Og soleiðis vil tað altíð vera, tí feløg broyta og endurskoða eisini sínar ætlanir. Tað er ikki óhugsandi, at nýggj feløg koma inn í føroyska økið í ár, tvs. at tey keypa seg inn í verandi loyvi. Sosialurin skilur, at bretska oljufelagið Dana skal hava verið áhugað at keypa seg inn í loyvið, sum ENI er fyristøðufelag fyri, og har tað verður borað í summar. Eisini onnur oljufeløg hava víst áhuga fyri at keypa seg inn í sjeynda brunnin á landgrunninum skilst.



*West Phoenix, sum fer at bora á landgrunninum í summar*




*Transocean Rather boraði Williambrunnin fyri BP í fjør. Hann var turrur. Helst fer BP at taka seg úr føroyska økinum seinni í ár*

# Stórur spenningur um ENI boring í summar

Boringin av sjeynda leitibrunninum á landgrunninum í summar verður tann mest spennandi hendingin í hesum árinum, tá talan er um royndirnar at finna olju og gass í føroysku undirgrundini sigur stjórin á Jarðfeingi, Petur Joensen við Portalin.

– Vit síggja fram til boringina av sjeynda brunninum, sum ENI fer at bora í summar, men skjøtul verður eisini settur á nógv annað áhugavert virksemi á landgrunninum, eitt nú seismiskar kanningar. Har verður rættiliga fitt av arbeiði sigur Petur Joensen, stjóri á Jarðfeingi.

Hann vísir tó á, at vegna val vórðu loyvini í triðju rundu latin rættiliga seint, so tað fer sjálvandi eisini at taka meira tíð enn upprunaliga mett at fara undir kanningarnar. Men kortini eru útlit til, at fleiri seismiskar kanningar verða gjørdar á landgrunninum í hesum árinum. Ein spurningur, sum eisini verður aktuellur í hesum árinum eru øll loyvini, sum nú eru komin hartil, at feløgini mugu taka støðu til, um tey vilja bora ella ikki. Hetta er rættiliga spennandi eisini at fáa kunnleika um.

Petur Joensen vil tó ikki siga, hvørji hesi loyvini eru og hvørji arbeiðsprogrammini hjá ymsu feløgunum eru. Tað mugu feløgini sjálvi upplýsa um heldur hann. Enn er árið ungt, og eitt av málunum, sum Jarðfeingi fera t brúka nógva orku uppá er at finna fram til, hvussu stovnurin skal spara 2 mill. kr. Av rakstrinum, nú játtanin á fíggjarlógini reelt er skerd úr 14 niður á 12 mill. kr.

Petur Joensen vísir á, at Jarðfeingi nú hevur fingið boriumsókn frá ENI. Umsóknin verður nú viðgjørd. Pallurin, sum skal bora Anne Marie brunnin er júst farin undir sína fyrstu boriuppgávu í Noregi og kemur so henda vegin í summar ella seinni.

Vit spurdu stjóran á Jarðfeingi, um hann kann tryggja oljufeløgunum, sum hava bundið seg til at gera kanningar og bora á landgrunninum, at skerjingarnar á játtanini til stovnin ikki fara at ganga út yvir teirra virksemi.

– Tað kann eg sjálvandi ikki í løtuni. Tað verður ein raðfesting, nú vit hava eina minni játtan til okkara virksemi. Men eg rokni ikki við, at skerjingin fer at nerva leitingina.

Petur Joensen leggur aftrat, at nú vit hava gjørt eitt so stórt arbeiði fyri at fáa oljufeløgini at gera íløgur her, so má hetta eisini fylgjast upp frá føroyskari síðu.